umhvørvisstovan

# GÓÐKENNING

Við heimild í kunngerð nr. 72 frá 3. juni 2013 um góðkenning av virkjum, sum framleiða, umvæla og endurnýggja pakkitilfar, plattar o.a. úr viði góðkennir Umhvørvisstovan við hesum:

| | |
|---|---|
| Navn á virkinum:<br>**Verkstaðurin á Brekku** | |
| Bústaður hjá virkinum:<br>Á Brekku 31, 700 Klaksvík | |
| Galdandi fyri virksemið:<br>At framleiða pakkitilfar, plattar o.a. úr hitaviðgjørdum viði | |
| V-tal:<br>404802 | Góðkenning nr.:<br>FO 003 HT |
| Galdandi frá:<br>03-02-2026 | Galdandi til:<br>03-02-2029 |
| Mál nr.:<br>25/33603 | |

Argir, hin 03-02-2026

Sigga Jacobsen, deildarleiðari

Rakul Mortensen, málsviðgeri

umhvørvisstovan

## 1. Heimild

Henda góðkenning at framleiða, umvæla og endurnýggja pakkitilfar úr viði er givin við heimild í § 2, stk. 1 í kunngerð nr. 72 frá 3. juni 2013 um góðkenning av virkjum, sum framleiða, umvæla og endurnýggja pakkitilfar, plattar o.a. úr viði.

Sambært § 3 í kunngerðini setur Umhvørvisstovan treytir í góðkenningini, og sambært § 4 hevur Umhvørvisstovan eftirlit við, at ásetingarnar í kunngerðini og treytirnar í góðkenningini verða hildnar.

Treytirnar í hesi góðkenning byggja á *International Standard for Phytosanitary Measures* (ISPM No. 15, *Regulation of wood packaging material in international trade*, 2018), sum er partur av reglunum undir *International Plant Protection Convention* (IPPC). Sambært hesum standardi hava myndugleikarnir í framleiðaralandinum ábyrgd av at tryggja og prógva, at framleiðslan fer fram sambært treytunum í standardinum.

## 2. Umsókn

Í samband við endurnýggjan av góðkenning til framleiðslu av plattum hevði Umhvørvisstovan samskifti við Verkstaðin á Brekku, undir Almannaverkinum, hin 18. desember 2025.

Hin 5. januar 2026 varð umsókn móttikin hjá Umhvørvisstovuni um framhaldandi framleiðslu av plattum úr hitaviðgjørdum viði.

Eftirlit á staðnum varð framt hin 6. januar 2026.

## 3. Lýsing av virkseminum

Verkstaðurin fær hitaviðgjørt[1] og avbarkað timbur frá Sp/F Atlantshav, sum hevur góðkenning at handfara hitaviðgjørt timbur sambært International Plant Protection Convention (IPPC) og International Standard for Phytosanitary Measures (ISPM No. 15). Verkstaðurin hitaviðgerð ikki sjálvur; bert ISPM 15-hitaviðgjørt timbur verður nýtt í framleiðsluni.

Framleiðslan fer fram í leigaðum hølum á Brekku 31, 700 Klaksvík. Framleiðslan er innandura, meðan goymsluøki eru uttandura. Plattarnir verða seldir til virkir í Føroyum.

Verkstaðurin á Brekku er eind undir Trivnaðartænastuni, sum er partur av Almannaverkinum. Framleiðslan av plattum verður framd av brúkarum við serligum avbjóðingar. Starvsfólkini á verkstaðnum hava ábyrgdina av at hava eftirlit við framleiðsluni, stuðla undir upplæring, fylgja við arbeiðsgongdini og eftirkannað, at framleiðslan er í lagi.

Framleiðslan av plattum fer fram í fimm stigum:

[1] *Viður, sum heilt ígjøgnum í minst 30 samanhangandi minuttir er hitaður til í minsta lagi 56 °C, ISPM No. 15*

1) Plankar verða kubbaðir í klossar (kubbar).
2) Kubbar verða skotnir í brettir (tríggir kubbar í hvørt bretti).
3) Brettir til sjálvan plattin verða sett saman.
4) Kubbarnir verða festir undir plattin.
5) Merking fer fram við at brenna í tveir teir mittastu kubbarnar á hvør sínari síðu á plattinum

Plattarnir verða síðani samlaðir og festir saman við stálbandi, 20 stk. í hvørjari eind, og settir á uttandura goymsluøki.

Verkstaðurin framleiðir upp umleið 5.000 plattar um árið. Plattarnir verða seldir til tvey til trý virkir í Føroyum.

Verkstaðurin á Brekku hevur mannagongdir fyri skjalprógving av hitaviðgjørdum timbri, framleiðslu og merking av plattum, upplæring av starvsfólki og handfaring av frávikum í framleiðsluni.

## 4. Málsviðgerð

Grundarlag undir málsviðgerðini eru hesi skjøl og upplýsingar:

- Umsókn um endurgóðkenning, móttikin 5. januar 2026.
- Lov nr. 370 af 21. december 1938 for Færøerne om bekæmpelse af smitsomme plantesygdomme og skadedyr.
- Kunngerð nr. 72 frá 3. juni 2013 um góðkenning av virkjum, sum framleiða, umvæla og endurnýggja pakkitilfar, plattar o.a. úr viði.
- International Plant Protection Convention (IPPC), 1997.
- International Standards for Phytosanitary Measures No. 15 (ISPM No. 15, *Regulation of wood packaging material in international trade*, 2018).
- Vegleiðing til virki, sum framleiða ella umvæla plattar o.a. úr innfluttum, viðgjørdum timbri (hereftir nevnd Plattavegleiðingin).
- Eftirlit á staðnum hin 6. januar 2026.
- Samskifti við verkstaðin.

## 5. Góðkenningartreytir

Góðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum:

### 5.1. Almennar treytir

5.1.1. Hendan góðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á verkstaðnum. Øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið og vera kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

5.1.2. Góðkenningin fevnir um framleiðsluhøll og uttandura goymsluøki, sum verkstaðurin ræður yvir.

5.1.3. Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 7 dagar eftir at broytingin er framd.

5.1.4. Framleiðslan skal lúka treytirnar í *International Plant Protection Convention* (IPPC) og *International Standard for Phytosanitary Measures* (ISPM No. 15), umframt Plattavegleiðingina. Tó er tað altíð seinasta útgáva av ISPM No. 15, sum er galdandi.

5.1.5. Verkstaðurin skal hava yvirlit yvir øll merkistempul í nýtslu. Merkistempul, sum ikki eru í nýtslu, skulu goymast á tryggum stað ella fyribeinast.

5.1.6. Verkstaðurin er undir eftirliti hjá Umhvørvisstovuni.

5.1.7. Umsókn um endurnýgging av hesi góðkenning skal verða Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi tríggjar mánaðir, áðrenn henda góðkenning gongur út.

### 5.2. Innrætting og rakstur

5.2.1. Framleiðslan sambært hesi góðkenning skal altíð skipast soleiðis, at treytirnar í góðkenningini verða hildnar.

5.2.2. Alt økið, sum henda góðkenning fevnir um, skal vera væl skipað og ruddiligt, og verkstaðurin skal tryggja, at óviðkomandi ikki hava atgongd.

5.2.3. Bert timbur, sum er viðgjørt sambært ISPM No. 15 (Annex 1), kann nýtast til framleiðslu og umvæling av pakkieindum úr viði.

5.2.4. Skjalprógv fyri timbur, sum verður nýtt til framleiðsluna, skal í minsta lagi lúka treytirnar sambært ISPM No. 15 og samsvara við Plattavegleiðingina.

5.2.5. Allar framleiddar, umvældar og endurnýggjaðar pakkieindir skulu merkjast sambært ISPM No. 15 (Annex 2) og samsvara við Plattavegleiðingina.

### 5.3. Mannagongdir og innaneftirlit

5.3.1. Verkstaðurin á Brekku skal í minsta lagi hava skrivligar mannagongdir fyri hvørt av niðanfyri nevndu punktunum, sum tryggja:

1. at alt timbur, sum verkstaðurin tekur ímóti til framleiðslu ella umvæling av pakkieindum úr viði, er viðgjørt á góðkendum virki sambært ISPM No. 15 og hevur neyðug skjalprógv sambært Plattavegleiðingini.
2. at tað bert verður brúkt timbur til framleiðsluna, sum er viðgjørt sambært ISPM No. 15 (Annex 1) og Plattavegleiðingini.
3. at viðgjørt timbur altíð verður hildið skilt frá óviðgjørdum timbri, bæði á goymslu og í sambandi við alla framleiðslu og flutning, sambært ISPM No. 15 og Plattavegleiðingini.
4. at pakkieindir skulu merkjast eftir ásetingunum í ISPM No. 15 (Annex 2) og Plattavegleiðingini.
5. at møguligir feilir í framleiðsluni altíð verða staðfestir, skrásettir og rættaðir sambært ISPM No. 15 og Plattavegleiðingini.
6. at møgulig staðfesting av skordýrum og øðrum óvæntaðum viðurskiftum verður skrásett, fráboðað til Umhvørvisstovuna og kannað sambært Plattavegleiðingini.
7. at góðkendar mannagongdir altíð verða hildnar, og at tær regluliga verða eftirmettar og eftir tørvi broyttar, sambært ISPM No. 15 og Plattavegleiðingini.
8. at bæði verandi og nýggj starvsfólk, sum røkja uppgávur í sambandi við framleiðslu og handfaring av viðgjørdum timbri, skulu hava neyðuga upplæring sambært ISPM No. 15 og Plattavegleiðingini.

5.3.2. Verkstaðurin á Brekku skal regluliga, og minst eina ferð um árið, eftirmeta mannagongdirnar nevndar í 5.3.1 (1) – (8). Úrslitið av eftirmetingini skal skrásetast.

5.3.3. Steðgar framleiðslan í meira enn fýra vikur, skulu allar viðkomandi mannagongdir gjøgnumgangast, áðrenn framleiðslan verður tikin upp aftur. Gjøgnumgongdin skal skrásetast.

5.3.4. Umhvørvisstovan kann í serligum førum, sum liður í eftirliti, krevja broytingar í verandi mannagongdum ella áseta aðrar mannagongdir enn tær, nevndar í 5.3.1.

5.3.5. Mannagongdirnar nevndar í 5.3.1 (1) – (8), umframt møgulig ískoyti, skulu altíð vera til skjals á framleiðslustaðnum hjá verkstaðnum.

## 5.4. Rakstarskráseting

5.4.1. Verkstaðurin á Brekku skal hava eina skrásetingarskipan, sum til eina og hvørja tíð kann góðtakast av Umhvørvisstovuni.

5.4.2. Verkstaðurin skal skráseta hesar upplýsingar:

- Navn, bústað og góðkenningarnummar hjá veitarum
- Avrit av góðkenningarskjølum hjá veitarum
- Øll handilsskjøl viðvíkjandi móttøku/veiting av viðgjørdum timbri
- Øll skjøl,sum verða brúkt í sambandi við pkt. 5.3.1 - 5.3.3.

5.4.3. Rakstrarskrásetingarnar skulu goymast í 5 ár og Umhvørvisstovan skal til eina og hvørja tíð kunna síggja tær.

## 5.5. Eftirlit

5.5.1. Umhvørvisstovan kann fara á móttøkustað, har pakkieindir úr viði verða uppskipaðar, fyri at eftirkanna vøru, merking og tilhoyrandi skjalprógv.

5.5.2. Umhvørvisstovan skal til eina og hvørja tíð kunna kanna skjalprógv fyri innflutningi, viðgerð og merking á verkstaðnum.

5.5.3. Umhvørvisstovan kann, í samband við eftirlit, fara ígjøgnum mannagongdir fyri skjalprógving, framleiðslu og merking av pakkieindum úr viði saman við viðkomandi ábyrgdarstarvsfólki á verkstaðnum. Hetta verður tó í mesta lagi tvær ferðir um árið.

# 6. Gildistíð

Henda góðkenning er galdandi í 3 ár frá dagfestingini. Um ávísar broytingar henda í virkseminum, skal Umhvørvisstovan gera nýggja meting.

# 7. Afturtøka av góðkenning

Sambært § 5 í kunngerð nr. 72 frá 3. juni 2013 kann Umhvørvisstovan taka góðkenningina aftur, um Verkstaðurin á Brekku ikki lýkur treytirnar í hesi góðkenning.

# 8. Kæra

Henda góðkenning kann sambært § 6 í kunngerð nr. 72 frá 3. juni 2013 kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, at avgerðin er móttikin. Kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum síðani sendir hana til landsstýrismannin í umhvørvismálum við skjølunum í málinum.